LM-070/2020

Fylgiskjal 19

36

samtak

Hoyringsskriv viðvíkjandi broytingum í eftirlønarlógini og rentutryggingarlógini

Viðvíkjandi eftirlønarprosentinum, so vilja feløgini staðiliga heita á politiska myndugleikan um at lata eftirlønarprosentið standa á 12, og heldur hækkað Samhaldsfasta, um ynski er um, at veksa um eftirlønina hjá pensjónistum framyvir. Við at hækka Samhaldsfasta verður eisini tryggjað, at øll fáa lut í útgjaldinum. Samhaldsfasti er ein trygg skipan, sum hevur gott kjølfesti og sum seinastu árini veruliga hevur prógvað sítt virði.

At hækka og lækka eftirlønarprosentið í heilum er ikki gott, og átti tað at verið nóg mikið, at hava eina minstuáseting á 12% heldur enn 15%. Fyri tímaløntar arbeiðsfólk er ríkiligt at seta 12% til síðis til ellisárini, men hetta nýtist ikki vera nóg mikið fyri aðrar lønarbólkar, ið hava hægri lønir. Hesir hava eisini møguleika at hava hægri eftirløn, og tað hava fleiri lønarbólkar eisini nýtt høvi til. Um hugt verður at sáttmálunum á arbeiðsmarknaðinum í dag sæst, at flest allir lønarbólkar liggja á eftirløn ímillum 10% og 16%.

Tikið verður undir við fleiri av teknisku ásetingunum í uppskotinum, eitt nú er gott at árliga javningin av útgjaldinum verður tikin av. Javningin er somikið lítil, men skapar stóra umsitingarligar byrður og ger harvið umsitingina dýrari hjá einstaka eftirlønmóttakaranum. Eisini verður lagt upp til, at umsitingin má fylgja málinum og regulera gjaldið í lóg, hetta er skilagott og skuldi tryggjað, at myndugleikar fáa tryggjað at eftirlønargrunnar kunnu í felag broyta gjøld við broyttum umstøðum. Tað skuldi ikki verið trupult at fylgt hesum, og skuldi hetta verið gjørt í samstarvi við eftirlønargrunnarnar, Taks og Fíggjarmálaráðið.

Undirritaðu heita á Fíggjarmálaráðið um at tryggja, at fyritíðarpensjónistar eisini fáa pensjónsuppsparing. Fyritíðarpensjónistar er ein av teimum heilt fáu bólkunum, ið heilt standa uttanfyri eftirlønina, og tað er ikki rætt at útihýsa henda bólkin. Fyritíðarpensjónistar er ein sera fjølbroyttur bólkur av fólki, summi bera brek ella hava sjúku, so tey ongantíð hava verið á arbeiðsmarknaðinum meðan onnur vera rakt av sjúku, skaða ella øðrum, sum ger, at tey noyðast av arbeiðsmarknaðinum í úrtíð.

Tórshavn 11.02.2020

Georg F. Hansen, formaður í Føroya Arbeiðarafelag

Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag

Jastrid W. Niclassen, forkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag

Arthur Guðjonsson, formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag

Samtak - stoffalág 17 – FO-100 Tórshavn
tlf 210013 - www.samtak.fo - samtak@samtak.fo